# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Mariumessa verður dagur málsins

Tað er eitt áhugavert tiltak, sum Føroyska Málnevndin og Málstevnunevndin hava biðið landsstýriskvinnuna í mentamálum taka stig til, Dagur Málsins, sum á fyrsta sinni verður hildin í morgin, á mariumessu á vári, sum eisini er føðingardagurin hjá málmanni okkara mikla, V. U. Hammershaimb, sum varð føddur fyri 191 árum síðani.

Í samrøðu her í blaðnum í gjár segði Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, at hesin dagur ikki er skipaður út frá tí, at føroyska málið er hótt. Hon heldur hinvegin, at málið hevur uppiborið, at vit vísa tí áhaldandi áhuga.

Við tí í huga at skapa størri málsligt tilvit verður ein málrøktarvirðisløn latin, sum er upp á 40.000 krónur. Nú vita vit ikki, hvussu henda málkapping verður skipað - um tað er onkur, sum hevur havt málið sum sítt lívsstarv, ella tað er onkur, sum á einhvønn hátt hevur gjørt málsligan mun, ið fær hendan heiður. Men tað fáa vit so at síggja, og uttan iva verða fleiri hugsanir um, hvørt tað var tann rætti, sum fekk hendan heiður.

Tað er rætt sum landsstýriskvinnan sigur, at málið ikki er hótt. Tað er fantastiskt, at føroyska málið hevur hórað so væl undan, sum tað hevur. Tí tað var veruliga hótt. Vit føroyingar duga væl at fílast á málburð hjá hvørjum øðrum, og tað er ikki av ongum. Tað er rættilga ymiskt, hvussu fólk duga at málbera seg, bæði málsliga og á skrift. Og tað skerst ikki burt, at dugir tú illa stava - at seta eddini, so verða tínir eginleikar virdir hareftir.

Øll sum hava gingið í miðnámsskúla hava havt lærarar, sum siga, at fólkaskúlin ikki hevur givið næmingum nóg gott málsligt kjølfesti. Kemur tú á læraraskúla, so verður drunnurin aftur borin víðari. Men føroyska málið er ikki verri at læra, enn onnur mál. Tað er eingin trupulleiki at læra fólk at seta ð og komma. Trupulleikin er bara tann, at grundarlagið mangan ikki er nóg gott, og so verður úrslitið hareftir. Tí eigur at verða tikið um rótina á hesum trupulleika: Tað er at útbúgva fólkaskúlalærarar, so teir betur eru førir fyri at undirvísa í føroyskari málllæru. Eitt er púra vist, at tú kanst ikki læra børn tað, tú ikki skilir sjálvur.

Tað man vera á fáum arbeiðsplássum, at málsligur spurningar verða so nógv umrøddir, sum á eini redaktión sum okkara. Og tey munnu vera fá, sum arbeiða so nógv við føroyska málinum, sum fjølmiðlafólk - og ofta undir sera stórum tíðartrýsti. Men at heiðra Hammershaimb við at skipa mariusmessu sum Dag Málsins er eitt frálíkt tiltak, sum vit gleða okkum til.

**Sosialurin**

## At ákæra ungdómin fyri líkasælu er óumhugsað

**HANUS SAMRÓ**



*»Vit ungu eru ov líkasæl og ábyrgdarleys.* Vit eru líkasæl, tí tað eru alt ov fá, sum luttaka í politiska lívinum«, segði skrivarin hjá Ungmannafelagnum Samband, Katrin H. Petersen, á landsfundi leygardagin. Eg kundi ikki verið meiri samdur. Hesin blomstrandi og óspekti ungdómur, hesin villi og forvitni aldursbólkur er bara ikki eins eldhugaður og spírandi á politiska leikvøllinum.

Ungdómurin raðfestir onnur áhugamál, ið kveikja og stimbra sansirnar. Tey liva í einum heimi, har alt frá samrøðum til undirhald og tíðarspell ferðast eins skjótt og ljósið. Tìskil er tað skiljandi, at hesi drúgvu og orðatungu kjakini, henda óendaliga og óáhugaverda munnhøggingin kveikja annað enn áhugan. Tað er ikki spennandi, tað gongur ov seint. Men at ungdómurin verður ákærdur fyri líkasælu, tí vit síggja, at alt ov nógv ung fara yvir til Tjóðveldi, eru óheppin og óumhugsað orð. Og tað eru júst hesar viðmerkingar, hesar ákærur, ið gera, at ungdómurin sýnir politikki óvirðing.

Hví skulu tey sýna nøkrum so banalum virðing? Tað er ikki at vera líkasælur ella ábyrgdarleysur, um ein unglingi velur Tjóðveldi fram um Sambandið, ella um ein hevjar Javnaðarflokkin upp um Fólkaflokkin. Tað er at taka ábyrgd, ábyrgd fyri sínum sjónarmiðum. Ungmannafelagið Samband skuldi heldur spurt hví, hví velur ungdómurin Tjóðveldi? Hvussu skulu vit kveikja áhugan, hvussu fáa vit okkara visjónir út á bestan hátt? Hvussu fáa vit unglingar í okkara bás?

Við at ákæra ungdómin fyri líkasælu, tí tey hava eina aðra áskoðan, er at sýna teimum óvirðing. Haraftrat haldi eg ikki, at ungmannafeløgini kring landið hava røkt sínar skyldur. Tey hava meir ella minni ligið í dvala. Hendinga lesarabrøv ella meiningar hava verið í fjølmiðlunum, men ikki hevur tað skapt tað stóra kjakið. Útsagnirnar hjá Katrini H. Petersen eru til meira ampa enn gagn, og hartil kemur aftursvarið frá Unga Tjóðveldi, sum ikki tænir neutrala ungdóminum á nakran hátt. Hetta støðuga og ókonstruktiva kjakið er ikki nýtt fyribrigdi, men ein hoyrir um tað dag og dagliga, ár eftir ár. Tað sigur seg sjálvt, at fyrr ella seinni, so sløkkir ungdómurin fyri hoyrnini.

**Vón**

Men tað er tó gleðiligt, at ungmannafeløgini royna nú, saman við hinum at skipa fyri tiltøkum. Við at skipa fyri tiltøkum, ið eru til frama fyri vitanina hjá ungdóminum, er vegurin fram. Við at kunna ungdóminum um Føroya- eins og alheimssøgu, við at kunna um búskap og journalistikk, við at geva føroyska ungdóminum møguleika at røkka sær hægri vitan, er vegurin fram. Ein tann minsti flokkurin í føroyskum politikki, Miðflokkurin, eigur rós uppiborið fyri í heyst at hava skipað fyri politiskum skúla, har bæði fólkafloks-, sambands- og tjóðveldisfólk hildu fyrilestrar. Føroysku ungmannafeløgini kundu lært av hesum, tí tað ræður um at kveikja áhugan. Tað hevði verið skilabest, um ungmannafeløgini fingu eitt tílíkt tiltak í verk, soleiðis at bæði áhugaði og ikki áhugaði, uttan mun til politiska áskoðan, kundu savnast. Eitt tiltak, har serfrøðingar greiða frá sínari vitan, stimbra svøvntunga forvitnið, og síðst men ikki minst, geva ungdóminum okkurt at hugsa um. Út frá hesari vitan og royndum verður politiska áskoðanin skapt. Tá ræður um hjá politisku flokkunum eins og ungmannafeløgunum at selja sín boðskap.

Men at ákæra ungdómin fyri líkasælu er óumhugsað.

## Gamalt er, at ivin eigur at koma tí »sjúka« til góðar

**JENIS AV RANA**



- ein áheitan á tilskotsnevndina fyri heilivág viðvíkjandi stuðli til CTD heilivág.
- og til heilsumyndugleikarnar um at loyva genkanningum fyri at finna berarar av CTD.

Loksins tykjast fjølmiðlar hava skilt, at sannleikin um sjúkuna CTD er álvarsligari og minni fýrkantað, enn heilsumyndugleikar okkara higartil hava valt at trúgva. Ikki tí, teir hava væl vitað tað, tí meira enn ein, bæði úr læknafakliga og úr sjúkuumhvørv-inum, hava áður alment gjørt vart við, at málið er meira komplekst enn myndugleikarnir hava viljað verið við. Hesi, hvørs hugsanir nú tykjast fáa ljóð, vita, at vitanin um CTD er ov lítið ítøkilig til, at so avgjørdar avgerðir viðvíkjandi sjúku ella ikki, genkanningum ella ikki og tilskoti til carnitin ella ikki kunnu verða tiknar so avgjørdar, einvísar, og miskunnarleysar.

Sannleikin er jú, at læknavísindin, vegna vantandi kunnleika til sjúkuna CTD, til røttu kanningarhættirnir og til symptomir og viðgerðir av berarum, als ikki er samd- og hevur ymisk tilmæli. Nøkur meta avgjørd, at øll, ið so ynskja, eiga at fáa framda fullkomna kanning, herundir genkanning, og hesi eru somikið eyðmjúk, at tey, til granskingin sigur nakað annað, mæla til viðgerð av berarum- og sjálvsagt eisini stuðul til hesa viðgerð.

Gamalt er, at ivin eigur at koma tí »ákærda« til góðar - og tá um sjúku viðvíkir, átti eingin sum helst ivi at verið. Vit eiga bæði at kanna, viðgera og stuðla teimum, sum á nakran hátt kunnu hugsast at vera sjúk ella berarar av hesi álvarsligu sjúkuni, meðan granskingin leitar eftir einum svari, sum vónandi, áðrenn leingi frálíður, gevur okkum fullkomna svarið um hesa sjúkuna.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.